# Bárður Nielsen tók ikki ímóti eini útrættari hond

**– Sjálvt um vit í veruleikanum góðtóku at fara niður í løn, vildi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ikki góðtaka tað**

ARBEIÐSSTEÐGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er fíggjarmálaráðið og landsstýrið, sum hevur alla skyldina av arbeiðssteðginum sum nú er.

Tað ivast Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, ikki eina løtu.

Hann sigur, at í veruleikanum góðtók Starvsmannafelagið at fara niður í løn, men kortini vildi Bárður Nielsen ikki góðtaka tað.

– Vit rættu honum hondina, men hann tók hana ikki, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Semingsuppskotið gav Starvsmannafelagnum eina lønarhækking upp á 1%, men sáttmálin skuldi bara vera galdandi í eitt ár.

– Prísvøksturin seinastu tíðina hevur verið meiri enn 1% og tí er talan í veruleikanum um eina lønarlækking. Men vit voru sinnað at góðtaka tað í eitt ár, fyri at fáa frið á arbeiðsmarknaðinum, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum.



*– Vil Fíggjarmálaráðið, at skipini hjá Strandferðsluni skulu sigla, má landsstýrismaðurin venda sær til Starvsmannafelagið at vita um ein avtala kann gerast, sigur Gunnleivur Dalsgarð. Her er nýggi Smyril í Trongisvágsfirði leygarmorgunin. Lýsing hevur tikið myndina*

Men landsstýrið vrakaði semingsuppskotið og Bárður Nielsen tvíheldur framvegis um, at lønin skal ikki hækka.

Hann vil heldur ikki góðtaka ein eittárs sáttmála, tí hann metir ikki, at tað fer at geva frið á arbeiðsmarknaðinum.

Av tí at tað er Fíggjarmálaráðið, sum hevur vrakað semjuna, er ongin sáttmáli og so ber ikki til at arbeiða.

– Men sostatt er tað Fíggjarmálaráðið, sum einsamalt hevur skyldina av arbeiðssteðginum og tí er tað eisini fíggjarmálaráðið , sum hevur bóltin og eigur at spæla út.

Eitt, sum nógv hevur verið tosað um í sambandi við arbeiðssteðgin, er tað, at skipini hjá Strandferðsluna.

Í gjáramorgunin hevði ongin tosað við Starvsmannafelagið um at gera undantak fyri skipini hjá Strandferðsluni so at Suðuroy, Sandoy og Norðoyggjar, ikki vórðu avbyrgd frá meginøkinum.

– Vil Fíggjarmálaráðið hava partar av tí almenna virkseminum í gongd aftur, má landsstýrismaðurin venda sær til Starvsmannafelagið at vita um ein avtala ella ein fyribilsavtala kann gerast millum partarnar um tey økini, sum ætlanin er at fáa ígongd aftur, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Hann vil kortini ikki siga um Starvsmannafelagið hevði verið sinnað at tosa um undantaksloyvi til Strandferðsluna.

– Kortini fýlist hann á, at politikarar og onnur hava mestsum hug til at geva Starvsmannafelagnum skyldina fyri støðuna.

– Hetta er tað, sum hendir, tá ið ósemjur eru á arbeiðsmarknaðinum. Hetta er ikki at leggjast eftir nøkrum ávísing. At Strandferðslan liggur er einfalt ein avleiðing av eini ósemju og onki annað, sigur formaðurin í Starvsmannfelagnum.

– Og av tí, at tað var Fíggjarmálaráðið, sum vrakaði semingsuppskotið er tað eisini Fíggjarmálaráðið, sum spælir høgt spæl við samferðsluni ímillum oyggjarnar. Og trupulleikin kann loysastheilt einfalt við at góðtaka semingsuppskotið, leggur hann afturat.

# Útjaðarin skal ikki aftur leggjast lamin av arbeiðssteðgi

**Landsstýrið fer nú at taka ítøkilig stig fyri at forða fyri, at samferðslan aftur verður løgd lamin av arbeiðssteðgum**

ARBEIÐSSTEÐGUR OG SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta hongur ikki saman longur!

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sigur, at tað kann ikki góðtakast longur, at samferðslan verður løgd lamin av einum arbeiðssteðgi.

Tí hevur hann tosað við Bjarna Djurholm, landsstýrismann í arbeiðsmarknaðarmálum um at so skjótt hesin arbeiðssteðgurin er av, skal landsstýrið seta ein arbeiðsbólk at arbeiða fyri at finna eina loysn, so at samferðslan ikki aftur verður løgd lamin av arbeiðssteðgi.



*Eisini løgmaður var umborð á nýggja Smyrli. Her er hann í práti við Elberg Klettheyggj úr Sandvík, vinstrumegin og John Berg úr Nesi í Hvalba. So skjótt hesin arbeiðssteðgurin er av, fer landsstýrið at seta ein arbeiðsbólk at viðgera, hvussu vit sleppa undan at samferðslan verður rakt av arbeiðssteðgi*

– Tað kunnu vit gera útfrá tí sjónarmiði, at Smyril, Teistin og onnur Strandferðsluskip, eru partur av veganetinum. Vegenetið er annars ikki skert av arbeiðssteðginum og tí er tað ikki góðtakiligt, at tey, sum bara hava strandferðsluna at dúva uppá, skulu verða tey einastu, sum verða rakt í so máta.

– Tí ætlar landsstýrið at seta ein bólk at kanna eftir, hvussu tað kann fyribyrgjast at samferðslan verður løgd lamin, tí hon hevur so avgerðandi týdning.

Hann ásannar, at hetta er ein stórur trupulleiki hjá vanligum fólki, men ikki minst er hetta darvandi fyri vinnuna, sum missur pening og ikki fær lagt til rættis og hetta darvar eisini íløgum í heis øki í landinum, tí íleggjarar vilja hava støðug viðurskifti.

– Hetta eru ikki umstøður at bjóða vinnulívinum, staðfestir hann.

Hetta er annars eitt, sum politikarar hava tosað um í nógv ár. Beinanvegin hendan samgongan kom til, var ætlanin at taka málið upp, men tá sat ein bólkur og arbeiddi við viðurskiftunum á arbeiðsmarknaðinum og tað var ikki mett at vera skilagott at órógva tað arbeiðið.

– Men nú slepst so ikki undan at taka málið upp.

## Eitt álvarsmál

Løgmaður leggur dent á, at hann ætlar ikki at skerja rættin hjá fakfeløgunum.

– Men tað er við at verða ov nógv av tí góða, at tey somu økini í Føroyum ferð eftir ferð skulu kenna sviðan av arbeiðssteðgum og tað kann ikki vera meiningin.

Hann metir heldur ikki, at tað er heilt vandaleyst at so nógvir smábátar sigla við ferðafólki ímillum oyggjarnar nú á vetrardegi.

– Og tað er ikki lætt at greiða frá, at tað skal vera neyðugt hjá ferðafólki at sigla við eini gamlari slupp og smábátum, ímeðan tvey stór ferðamannaskip liggja bundin av eini ósemju.

Tí heldur løgmaður, at hetta avgjørt er rætta tíðin til at taka hetta málið um samferðsluna og arbeiðssteðgir upp til ítøkiliga viðgerð og tað verður nú gjørt.

Hann vil ikki siga nakað um, hvør loysnin skal vera, tí tað heldur hann at arbeiðsbólkurin skal koma til eina niðurstøð um.

Ein møguleiki hevur, sum hevur verið nevndur,er at gera manningarnar til tænastufólk, sum ikki hava loyvi at fara í verkfall.